gult30 cyan30 magenta30 svart30



# Leiðari

Í sambandi við at frítíðarskúli letur upp í Fuglafjarðar kommunu í august mánaða 2001 til 20 børn, so søkir Fuglafjarðar býráð við hesum eftir leiðara.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum samfelagi, har náttúran og ítróttin hava stóran týdning í dagliga arbeiðinum.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin kann

- Arbeiða sjálvstøðugt
- Verða førur fyri sjálvur at taka avgerðir í arbeiði sínum
- Virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og skúlan
- Hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- Gera neyðugar fyrireikingar til stovnsetanina av skipanini, hetta í samráð við leiðararnar av ansingarskipanunum í kommununi og við býráðsleiðsluna

**Meira fæst at vita**
um starvið við venda sær til: Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra, ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara, á telefon 444006.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli skulu vera Fuglafjarðar býráð, Norðuri í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður, í hendi í seinasta lagi **13. juni 2001 kl. 15.00.**

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 15. mai 2001*
**Fuglafjarðar býráð**

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

# Samskipari hjá fiskivinnuni á landi

Av tí at starvsfólk okkara ferð í annað starv søkir Føroya Arbeiðsgevarafelag eftir einum ráðgeva til skrivstovuna í Vinnuhúsinum.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um málsviðgerð fyri Føroya Ráfiskakeyparafelag, ið røkir áhugamálini hjá føroysku fiskavirkjunum. Viðkomandi kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við stjóran í Vinnuhúsinum og við nevndina í Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Arbeiðið fevnir m.a. um:
- Kanningar av felags viðurskiftum hjá limunum
- Vinnuumboðan í sambandi við myndugleikakrøv
- Útflutningsviðurskifti
- Samband við útlendska fiskivinnu og seljarar
- Málsviðgerð / skrivarauppgávur fyri nevndina í Ráfiskakeyparafelagnum

Vit vænta, at tú:
- hevur hóskandi útbúgving og hollar arbeiðsroyndir, serliga innan fiskivinnuøkið
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- hevur góð samstarvsevnir
- dugir væl at samskifta á føroyskum, donskum og enskum.
- hevur hollan telduførleika á brúkarastøði (Windows Office forrit)

Vit kunnu lova tær eitt fjølbroytt, áhugavert og krevjandi starv.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn, merkt "Starv", eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. mai 2001.
Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til Maritu Rasmussen, tlf. 31 18 64.

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**
Vinnuhúsið
Postsmoga 179
110 Tórshavn

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá 13 vinnufeløgum og í løtuni starvast 6 fólk í umsitingini.
Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møgulig kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og politiskari ávirkan. Feløgini taka sær av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum.

# Klinikkassistentur

Vit søkja eftir einum klinikkassistenti at byrja 01. juni ella eftir nærri avtalu.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til Tannlæknastovuna í Brekkugøtu 8, 100 Tórshavn, og má vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 29. mai 2001.

**Tannlæknastovan í Brekkugøtu**
Tlf. 315158
v/ Marner Gaard,
Ísak Thomassen og
Regin Eikhólm
tannlæknar

# Skúlastýrisvalið í Nes kommunu

Tey, ið enn ikki hava skrásett seg til vallistan, kunnu gera hetta við at venda sær til skúlastjóran í seinasta lagi 21. mai.

Seinasta freist at lata valevnislistar inn er 21. mai kl. 18.00.

Atkvøðugreiðsla til skúlastýrið verður 28. mai frá kl. 14.00 til 20.00. Valið fer fram í valhølinum hjá Nes Kommunu.

Veljarar, sum ikki kunnu møta valdagin, kunnu við at venda sær til formannin í valnevndini atkvøða við brævatkvøðu í seinasta lagi kl. 18.00 dagin fyri valdagin.

**Valnevndin**

# Eitt gott keyp

**BMW 525tds Executive DIESEL við 170hk**

Árg. 9/95 (5 1/2 ár), km 155.000. Við fartkontrol, aircondition, sportssetur, el-sóltak/spegl, fartelefonsett, centrallás, originalar BMW-felgur, nýggj kavahjól. Nýprísur uml. 510.000,00 kr.

Sera væl viðfarin og er sum spildurnýggjur. Boð undir kr. 225.000,- ongan áhuga.

**Tlf. 319489 - 219489**

# Tvøroyrar Bóltfelag

Tey, ið skulu hava tiltøk við í jóansøkuskránna 2001, skulu ringja og siga frá á tlf. 372480 ella senda fax til nr. 371814 í seinasta lagi fríggjadagin 15. juni.

**Fyrireikararnir**

Sosialurin
Veðrið Bilar Lýsingar
Tíðindi Viðmerkingar



gult31 cyan31 magenta31 svart31

**Felagið fyri Skrivstovu-, kramba- og teknisk starvsfólk**

Upplýsir um:
- sáttmálan
- starvsmannalógina
- frítíðarlógina o.a.

**Gerist limir - so standa vit sterkari!**

Tlf 316837 og 216837
Traðarvegur 20
Boks 1378
110 Tórshavn
skfelag@post.olivant.fo

Opið er soleiðis:
Mánadag - fríggjadag
9.00 - 12.00
13.00 - 16.00

veitst tú ikki tað? Sosialurin

# Scania P93 til sølu



Árg. 1991. Við nýggjari lift. Hevur isoleraðan kassa (Norfig), og er í góðum standi. Møguliga í býti við nýggjari lítlan vøruvogn

**Tlf. 314728**

**Føroya Postfelag**

# Skrivstovuhøli til leigu

Uml. 100 m² eru til leigu í hølunum hjá Føroya Postfelag, Tinghúsvegur 15. Hølið kann leigast við telduútgerð til undirvísing, ella bert sum skrivstovuhøli.

Nærri fæst at vita um hølið á tlf. 283794 ella 217231.

# Skrivstovufólk til Blákrossheimið

Til skrivstovu okkara á Blákrossheiminum verður søkt eftir skrivstovufólki at arbeiða hálvan dag, at byrja 1. juni 2001 ella skjótast møguligt.

Hevur tú áræði, tekur undir við blákrosshugsjónini, kann arbeiða sjálvstøðugt og hevur royndir innan skrivstovuyrki, við hóskandi útbúgving, so er tú tann, vit søkja.

Starvið verður lønt eftir avtalu við Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita við at ringja 315575 og spyrja eftir Sólborg Dulavík.

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum og ummælum verður at senda innan 25. mai 2001 til:

**Blákrossheimið**
Lynggøta 12
100 Tórshavn
Tlf. 315575
Fax: 315567
E-mail: blakross@blakross.fo

Blákrossheimið, ið er eitt viðgerðarheim fyri rúsevnismisnýtarar, er stovnsett av Bláa Krossi Føroya við góðkenning frá Føroya Landsstýri. Á heiminum eru 11,5 starvsfólk. Pláss er fyri 15 búfólkum. Eisini eru búfelagsskapir og eftirviðgerð knýtt at heiminum. Blákrossheimið verður fíggjað við árligari játtan frá landsstýrinum.
Blái Krossur Føroya er ein kristiligur hjálparfelagsskapur, sum hevur til endamáls at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum, at fyribyrgja misnýtslu av rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum, at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi, at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.

# Marknaðarstarv í Føroya Skúlabókagrunni

Eitt starv í Føroya Skúlabókagrunni verður lýst til setanar frá 1. august 2001.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um marknaðarføring av undirvísingarmiðlum til skúlaverkið og tað arbeiðið, sum av tí stendst. Umframt kann vera annað arbeiði, eftir tørvi.

Starvsfólkið skal røkja bóka- og undirvísingarmiðlasamskifti við skúlar, við avvarðandi skúlamyndugleikar, við bókasølurnar o.o. og skal millum annað taka sær av at lýsa undirvísingarmiðlar í fjølmiðlum, á Internetinum og aðrastaðni.

Til starvið krevst hollur kunnleiki til undirvísingarmiðlar, áhugi og hegni til marknaðarføring, eins og fíggjarligt innlit og góður teldukunnleiki hava stóran týdning.

Løn og setanartreytir verða at avtala eftir tí førleika, umsøkjarin hevur.

Royndartíðin er 1 ár.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera skúlabókanevndini í hendi í seinasta lagi 4. juni 2001.

Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá skrivaranum í skúlabókanevndini, telefon 31 61 00.

Tórshavn, 14. mai 2001

Føroya Skúlabókagrunnur
Skúlabókanevndin
Lützenstrøð 4 · FO-100 Tórshavn
Telefon 316100

# Bakaralærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan bakarayrkið, hava vit eitt læruplass leyst at søkja.

Bakaríið hjá Gunleivi hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt bakarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.

Bakaralæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram har tey hava lært, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri bakarar umborð á cruiseskipum, í oljuvinnuni og innan hotelvinnuna.

Bakaralæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving, til m.a. processteknolog.

Lærutíðin til bakara er 4 ár, harav 35 vikur á teknisk-um skúla.

Ætlanin er at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin, um tú verður liðug/ur við skúlan í summar.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Christian Nielsen.

Hevur hetta tín áhuga, so ring ella skriva til okkum innan 01/06-2001.

Hoyvíksvegur 65

**BAKARÍIÐ HJÁ GUNLEIVI**
Tlf. 22 51 60 ella 31 21 61

VEGG SAGING
Hurðar, vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SAGING
Rennir, keiðki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

GÓLV SLÍPING

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

www.sosialurin.fo